FCK hølvaði Esbjerg av

Við sannførandi spæli - serliga í seinna hálvleiki, vant FCK burturúr Esbjerg og sostatt er enn kapping um oddasessin í Superliguni

SUPERLIGA
Páll Holm Johannesen

FCK hevur fingið eina góða byrjan uppá várhálvuna, og eftir stórsigurin hjá FCK á Esbjerg skal Brøndby ansa sær. FCK sær út til at hava funnið stórspælið aftur, sum tryggjaði teimum meistaraheitið í fjør. Vegurin upp til oddaliðið er enn 7 stig, men um Brøndby missur fleiri stig, kann tað lættliga gerast ein sannur gysari um meistarheitið.

Tamur fyrri hálvleikur

FCK venjarin hevði aftur valt at byrja vid Toda og Zuma í álopinum, men lítið sást til teirra í fyrra hálvleiki. FCK-spælið tóktist heldur trilvandi fyrsta hálva tíman, og langt var ímillum møguleikarnar. Tó megnaði FCK seinastu tíggju minuttirnar av fyrra hálvleiki at trýsta Esbjerg somikið, at tað spurdist eitt mál burturúr. Tað var komandi Schalke 04 spælarin, Christian Poulsen, sum eftir bandaspæl vid Toda Jónsson setti bóltin í netið úr spískum.

Todi rættiliga eyðsýndur

Meðan fyrri hálvleikur ikki var serliga væl spældur, spíladi FCK seg rættiliga út í seinna hálvleiki. Ikki vóru meira enn fimm minuttir farnir, áðrenn støðan var 3-0. Eftir uppspæl í høgru kom bólturin innfyri, og Todi kundi lættliga seta fótin á og økja um FCK-leiðslunа. Løtu seinni fødi vánaligt Esbjerg-verjuspæl til, at Zuma púra leysur slapp at leggja bóltin í Esbjerg-málið. Alópsparið Todi og Zuma var væl fyri í Parkini sunnudagin, og lítið er at ivast í, at parið er fyrsta val á álopsplássunum. Nýkeypti Erik Mykland og Christian Poulsen vóru eisini sannførandi á miðvøllinum hjá FCK. Todi legði upp til tað fjórða málið, sum Morten Bisgaard stóð fyri eftir enn eitt bandaspæl vid føroyingin. Zuma og Bisgaard skutu hvør sítt mál aftrat til endaligu støðuna 6-0. Todi spældi allan dystin sunnudagin, og tað tykist sum, at hann er við at verða heilt klárur eftir drúgva skaðan. Hann var við í nógvum, og við einum máli og tveimum uppleggum verður tað sera torført hjá kappingarneytunum at rista Toda av sínum plássi í álopinum.

Eftir drúgva skaðastøðgin tykist Todi Jónsson nú veruliga vera komin fyri seg aftur í FCK-álopinum

Brøndby aftur á meistarakós

Brøndby varðveitti støðuna sum einsamalt oddalið og stevnir ímóti meistaraheitinum. Vejle er aftur farið á niðurflytingarpláss eftir tapið ímóti OB

SUPERLIGA
Páll Holm Johannesen

Eftir eina rættiliga slaka byrjan uppá várhálvuna er Brøndby aftur á røttu kós. Í einum vælleiktum dysti í Gladsaxe móti AB vann Brøndby við tveimum málum móti einum. AB var spælstýrandi í fyrra hálvleiki, men kortini var tað landsliðsleikarin Peter Madsen, sum legði gestirnar frammum. Áleyparin kom at liggja væl fyri í AB brotsteiginum og kundi lættliga skjóta sítt 14. mál hetta kappingarárið. Eitt vælupplagt AB-lið fekk tó stutt fyri hálvleik javnað vid brotssparki. Seinni hálvleikur var sera undirhaldandi við nógvum royndum á bæði málini, men tó endaði tað við einum ikki heilt uppibornum Brøndbysigri, tá innskifti Thomas Lindrup stutt undan dystarenda tryggjaði Brøndby tey trý stigini. Brøndby fekk við sigrinum hildið frástøduna til FCK og stevnir nú ímóti meistaraheitinum, sum teir ikki hava vunnið síðan 1998. AB mátti harafturímóti triðja dyst upp í slag fara av vøllinum uttan stig.

OB sendi Vejle á nidurflytingarpláss

Við ósigrinum móti OB er Vejle nú aftur í stórum niðurflytingarvanda. Við Christiani Høgna Jacobsen á vøllinum seinasta hálva tíman tapti Vejle 1-0 móti OB. Ikki heilt óvæntað var tað toppskjúttin í bestu donsku deildini, Kasper Dalgas, sum skeyt málið hjá fjónbúgvunum. OB var sum heild betra liðið, men tó hevði Vejle nakrar naskar royndir á OB-málið. Bestu royndini stóð Christian Høgni fyri, tá hann miðskeiðis í seinna hálvleiki var so óheppin at raka innaru síðu av tvørstongini, so bólturin brast út aftur í spæl. Sostatt hevur føroyski áleyparin enn fyrsta málið í Superliguni til góðar. Í botndystinum millum Lyngby og Silkeborg vann Silkeborg 5-0 og slapp sær harvið upp um niðurflytingarstrikuna. Dysturin millum AGF og Viborg var eitt sátt vónbrot, har hvørki av liðunum sýndi serliga gott fótbóltspæl. Dysturin endaði eisini málleysur, og AGF kundi takka málverjanum fyri tað eina stigið.

Støður

Danska superligan

		d	v – j – t	v mál	t mál	+/–	stig
1	Brøndby	22	14 – 5 – 3	52	18	34	47
2	FCK (M)	22	11 – 7 – 4	38	18	20	40
3	AaB	21	11 – 4 – 6	32	29	3	37
4	Esbjerg	21	10 – 3 – 8	34	33	1	33
5	FCM	21	8 – 8 – 5	28	18	10	32
6	AB	22	8 – 8 – 6	33	25	8	32
7	OB	21	8 – 8 – 5	35	32	3	32
8	Viborg	22	5 –10 – 7	25	27	–2	25
9	Silkeborg	22	5 – 5 –12	23	30	–7	20
10	AGF	22	4 – 7 –11	26	36	–10	19
11	Vejle	22	5 – 4 –13	28	55	–27	19
12	Lyngby	22	2 – 8 –12	20	54	–34	14

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Todi Jónsson (FCK)

Danska 1. deild

		d	v – j – t	v mál	t mál	+/–	stig
1	Køge	15	12 – 1 – 2	32	13	19	37
2	Frem	16	10 – 5 – 1	36	15	21	35
3	Farum	16	9 – 5 – 2	33	22	11	32
4	HFK Sønderj.	15	9 – 3 – 3	31	19	12	30
5	B 1913	16	9 – 3 – 4	30	24	6	30
6	Herfølge	16	7 – 5 – 4	24	18	6	26
7	AC Horsens	16	6 – 5 – 5	21	16	5	23
8	Randers F.	16	6 – 5 – 5	23	20	3	23
9	Brønshøj	16	5 – 3 – 8	25	30	–5	18
10	B 1909	16	5 – 3 – 8	29	39	–10	18
11	FC Aarhus	15	4 – 5 – 6	22	26	–4	17
12	Hvidovre	16	3 – 6 – 7	23	32	–9	15
13	Fredericia	15	3 – 4 – 8	19	22	–3	13
14	B93	16	3 – 3 –10	21	37	–16	12
15	Kolding IF	16	3 – 1 –12	29	45	–16	10
16	Skive	16	2 – 3 –11	19	39	–20	9

Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers F.), Óli Johannesen (Hvidovre), Johan Byrial Hansen (Fredericia)

Hollendska toto–deildin

		d	v – j – t	v mál	t mál	+/–	stig
1	Excelsoir +	27	17 – 7 – 3	63	24	39	58
2	RBC Roo'daal	27	17 – 5 – 5	63	30	33	56
3	FC Zwolle +	27	16 – 7 – 4	47	28	19	55
4	Emmen	27	15 – 6 – 6	44	30	14	51
5	ADO Den Haag	27	14 – 7 – 6	44	28	16	49
6	Cambuur/L. +	27	12 – 6 – 9	40	30	10	42
7	FC Volendam	27	10 – 7 –10	48	40	8	37
8	Heracles A.	27	11 – 4 –12	42	44	–2	37
9	Storm/Telstar	27	9 – 9 – 9	42	34	8	36
10	BV Veendam	26	10 – 6 –10	42	42	0	36
11	Haarlem	27	10 – 6 –11	34	34	0	36
12	Dordrecht '90	26	8 – 8 –10	46	46	0	32
13	Helmond Sp.	27	7 –10 –10	28	40	–12	31
14	G.A. Eagles	27	7 – 8 –12	36	46	–10	29
15	VVV	27	9 – 2 –16	42	57	–15	29
16	MVV	27	6 – 6 –15	35	51	–16	24
17	Eindhoven	27	4 – 6 –17	36	67	–31	18
18	Top/Oss	27	3 – 4 –20	19	80	–61	13

Perioduvinnararnir eru merktir »+«
Føroyskir leikarar: Súni Olsen (FC Zwolle)

Enska 3. deild

		d	v – j – t	v mál	t mál	+/–	stig
1	Plymouth	38	25 – 8 – 5	58	25	33	83
2	Luton	40	25 – 6 – 9	77	44	33	81
3	Mansfield	38	21 – 6 –11	61	45	16	69
4	Scunthorpe	40	18 –12 –10	70	49	21	66
5	Cheltenham	37	17 –13 – 7	57	41	16	64
6	Rochdale	38	17 –13 – 8	51	40	11	64
7	Shrewsbury	40	17 –10 –13	59	46	13	61
8	R&D	40	16 –12 –12	53	47	6	60
9	Hull C.	39	16 –10 –13	52	39	13	58
10	Kidderm.	39	16 – 8 –15	48	41	7	56
11	Hartlepool	39	14 –11 –14	57	44	13	53
12	Southend	40	13 –11 –16	46	49	–3	50
13	Swansea	40	13 –10 –17	49	60	–11	49
14	Macclesfield	40	12 –11 –17	34	47	–13	47
15	Exeter	38	13 – 8 –17	43	65	–22	47
16	Oxford Utd.	40	11 –13 –16	59	52	7	46
17	Carlisle	37	10 –13 –14	42	44	–2	43
18	Darlington	39	11 –10 –18	47	61	–14	43
19	Lincoln C.	39	10 –12 –17	39	53	–14	42
20	Leyton O.	39	11 – 9 –19	50	66	–16	42
21	Torquay	40	10 –12 –18	38	57	–19	42
22	York	36	11 – 8 –17	42	60	–18	41
23	Bristol R.	39	10 –10 –19	36	50	–14	40
24	Halifax	40	7 –11 –22	31	64	–33	32

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (Hull C.)

Vunnu vinnararnar

Hóast sera skerdir vunnu føroyingar á flatlondum ein góðan sigur á oddaliðnum í 2. deild, og fingu harvið eitt triðja pláss

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Vónirnar til seinasta dystin vórðu ikki av teim bestu. Hetta komst av, at tveir fastir mans høvdu givið avboð, samstundis sum IM John Rødgaard, sum eftir ætlan skuldi leika við, ikki fekk pláss í Mærsk flogfarinum vegna misskiljingar og at íslendski telvarin á liðnum, Hliðar Hreinsson, tíverri ikki møtti upp til dystin. Rani Nolsøe var hjástaddur í Danmark um vikuskiftið, og leikti hann tí eisini við gamla felagi sínum.

Eftir góðar tríggjar tímar var føroyska liðið afturúr 1-3, men skjótt vendist, og endaliga úrslitið bleiv 4,5 — 3,5 til útisetar okkara. John Arni Nilssen og Heini Olsen vunnu hvør síni talv. Báðir leiktu væl og vunnu uppiborið. John Arni mundi mist fyrimunin, men vísti góðar endatalvsdygdir tá hann loksins vann við svarta fólkinum móti einum 2300-telvara. Heini leikti somuleiðis væl, og hansara avriksstyrki er á heili 2514 eftir kappingina, og prógvar hetta at Heini sanniliga er á røttu gongd aftur. Eftir donsku liðkappingina er Heini allarhelst omanfyri 2300 í føroyskari rating aftur, meðan John Arni hevur umleið eini 2380.

Eyðun Nolsøe og Rani Nolsøe høvdu báðir hampiligar støður, men høvdu ringt við at bróta verjugarðar flatlendinga niður, og tískil varð javnleikur úrslitið. Innhopparin fyri íslendaran Hliðar varð Regin Reinert, og hevði hann eisini góða støðu, men tapti tíverri. Carl Eli N. Samuelsen á sætta borði hevði somuleiðis góða støðu, men danin vardi seg væl og javnleikurin slapst ikki uttanum.

Terji Petersen leikti væl, og niðurspældi mótstøðu mann sín, meðan Heini Danielsen hinvegin fekk harða viðferð og mátti leggja kongin.

Einstøk úrslit hjá fø.

John Arni Nilssen	4/6
Heini Olsen	4,5/6
Flóvin T. Næs	2/4
Eyðun Nolsøe	3,5/7
Bogi Ziska	1/2
Hlidar Hreinsson	2,5/6
RógviW.Rasmussen	4/5
Carl E. N. Samulsen	4/7
Eykamenn:	
Heini Danielsen	1,5/5
Terji Petersen	2,5/3
IM John Rødgaard	0,5/1
Rani Nolsøe	0,5/1
Magnus Egholm	0,5/1
Arild Rimestad	0,5/1
Regin Reinert	0/1

Sum tað sæst vórðu nógvir telvarar nýttir at manna liðið í ár, men kortini gekst væl og úrslitið bleiv sum sagt eitt triðja pláss, deilt við Helsingør.

Endaliga støðan í toppinunm í 2. Deild:

K41	34,5
Skakspilleren	32
Helsingør	31,5
Føroyar	31,5

Enn ein succés

Gøtu Talvfelag skipaði í vikuskiftinum fyri Barna- og Ungdómskapping — tí triðu í røðini - og væl gekst. Ikki færri enn 180 børn og ungdómar høvdu teknað seg til hesa stórligu liðkapping millum skúlaungdómar, og sum skilst høvdu gøtumenn ein heldur positivan trupulleika, tí sera trongligt varð nevnliga í skúlastovunum sum nýttar vórðu, og er hetta hóast alt at fegnast um. Børn kring landið tykjast at hava fangað ítrótt okkara, og vónandi spyrst nógv burturúr hesari framgongd.

16 lið høvdu teknað seg til kappingina fyri 4. Flokkar og yngri, og hesaferð eydnaðist tað liði úr Havnini at vinna framanfyri klaksvíkingar. Í elsta bólkinum — 5. Flokk — 10. Flokk — har 21 lið høvdy teknað seg, býttu lið úr Havnini og Klaksvík fyrsta plássið, meðan miðvíngar fingu triðja pláss. Í blaðnum í morgin prenta vit úrslitini og støðurnar frá kappingini.

Ætlanin er at stórur endabrestur í røðini av hesum vælumtóktu barnakappingunum verður í Norðurlandahúsinum 13. Apríl. Nærri verður lýst við hesum tiltaki eftir páskir.

Blindtalvið hesa vikuna

Ein serlig kapping verður í løtuni leikt í Frankaríki. Hvønn dag verður leikt eitt kviktalv og eitt blindtalv móti sama mótstøðumanni. Vladimir Kramnik og Veselin Topalov vunnu báðir kappingina í fjør, og longu í fyrsta umfari í ár hittust teir. Kviktalvið teirra millum endaði javnt, meðan Topalov vann eitt gott blindtalv móti tí annars óvinniliga Kramnik.

Topalov,V (2739) - Kramnik,V (2809)
Amber Blindfold Monaco MNC (1), 16.03.2002

1.Rif3 Rif6 2.c4 e6 3.Ric3 Bb4 4.d4 c5 5.g3 Rie4 6.Fd3 Fa5 7.Fxe4 Bxc3+ 8.Bd2 Bxd2+ 9.Rixd2 Ric6 10.dxc5 b6 11.Bg2 Bb7 12.Fe3 Rib4 13.0-0 Ric2 14.Fg5 (Topalov fær gott spæl fyri býtismunin) 14...Bxg2 15.Rib3 Fa4 16.Fxg7 Rf8 17.Kxg2 Rixa1 18.Rxa1 bxc5 19.Rc1 d6 20.Rid2 0-0-0 21.Rie4 Fc6 22.f3 f5 23.Rif6 Fc7 24.Fxc7+ Kxc7 25.Rixh7 (hvítur hevur helst fyrimun, vegna frífinnu) 25...Rg8 26.h4 Rb8 27.b3 a5 28.Rig5 Kd7 29.Rc3 a4 30.f4 axb3 31.axb3 Rb6 32.Re3 Re8 33.Kf2 e5 34.fxe5 dxe5 35.Rf3 Rf8 36.Rie4! Rc6

37.g4 (og nú fær Topalov leikt seg til tvær avgerandi frífinnur) 37...f4 38.h5 Ke6 39.Rd3 Rg8 40.Kf3 Rb8 41.e3 Rf8 42.Rd5 Rb8 43.Rxc5 Rcb6 44.Rig5+ Kf6 45.exf4 Rxb3+ 46.Ke4 exf4 47.Kxf4 R3b6 48.Rc7 R8b7 49.Rie4+ og Kramnik gavst (Ke6 50.Rxb7 Rxb7 51.Ric5+) 1-0

Hvidovre óheppið ímóti B 1909

Mál frá føroyska landsliðsspælaranum Óla Johannesen var ikki nóg mikið at forða B 1909 øll trý stigini.

1. DEILD
Páll Holm Johannesen

Næstbesta danska deildin fór undir várhálvuna seinasta vikuskifti, og bara tann eini føroyingurin spældi. Umframt Óla Johannesen í Hvidovre og Atla Gregersen í Randers Freja er eisini Johan Byrial Hansen farin í næstbestu deildina at leika. Hann er útlæntur til Fredericia. Dysturin hjá Fredericia móti oddaliðnum Køge bleiv útsettur, so tað verður ikki fyrr enn komandi vikuskiti, at Johan leikar sín fyrsta dyst. Randers Freja vann uttan Atla Gregersen 1-0 ímóti botnliðnum B 93, og liggur nú í miðjuni í fyrstu deild. Hvidovre var á Fjón og leikti útidyst ímóti B 1909, og hóast leikliga yvirvág eyðnaðist tað ikki Hvidovre at fáa stig. Dysturin endaði 2-1 til heimaliðið, og málið hjá Hvidovre skeyt Óli Johannesen eftir ein góðan tíma. Kappingin um uppflytingina harðnar, og fleiri lið eru um boðið. Køge er gott boð til annað uppflytingarplássið, meðan eini fimm lið berjast um hitt plássið.

Týdningarmikil javnleikur

Súni Olsen var ikki á liðnum, tá FC Zwolle leygardagin spældi javnt í útivølli móti ADO den Haag. Hetta er eitt av liðunum, sum saman við Zwolle stríðist um ein uppflytingarsess, og í so máta kann ikki sigast annað enn, at talan varð um eitt gott úrslit hjá Zwolle.

Gestirnir komu eisini á odda tiðliga í dystinum, tá ein leikari hjá Haag gjørdi sjálvmál, men á hálva tímanum kom javnvág í aftur roknskapin.

Hóast Zwolle nú datt niur á triðja plássið, so styrkti liðið um støðuna, tí oddaliði úr Excelsoir tapti sín dyst, soleiðis at munurin upp til beinleiðis uppflytingina minkaði enn eitt stig.

Hósdagin verður so veruliga styrkisroyndin hjá Zwolle, tá teir á heimavølli taka ímóti liðnum, sum er á øðrum plássi. Ein sigur her hevur við sær, at talan helst verður um kapprenning millum Zwolle og Excelsoir um oddasessin, og enn eigur Zwolle heiamdyst móti oddaliðnum tilgóðar.

-jm

Sama søgan

Julian Johnsson var á vøllinum allar 90 minuttirnar, men tað hjálpti tó lítið hjá Hull, sum enn eina ferð mátti taka til takkar við teprum tapi.

Seinastu tíðina er tað vorðið at kalla ein vani, at Hull letur mótstøðuna skora móti dystarenda, og soleiðis var eisini hesaferð. Oxford fekk einasta málið í dystinum tá knappir 10 minuttir vóru eftir at leika.

Í ensku miðlunum verður annars sagt, at spælið hjá Hull mundi vera á eini leið, men hetta man tó ikki vera nøkur serlig troyst hjá Julian og teimum. Teir eru nú á nígggjuna plássinum í deildini, og hóast tað bert eru trý stig upp til ein play-off sess, so skal nógv broytast hjá Hull, sum hóast venjaraskiftið bert hevur vunnið ein av seinastu sjey dystunum.

-jm